# Asbjørn-bamsir til barnadeildinina

**Mikudagin læt Føroya Astma /Allergifelag allergi-testaðar bamsir til barnadeildina á Landssjúkrahúsinum. Bamsirnar, ið hava fingið navnið Asbjørn, verða lætnir í samstarvi við danska Astma-Allergi Furbundet**

BAMSIR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

"Asbjørn projektet" byrjaði, tá danska Astma-Allergi Furbundet læt bamsir til Roskilde Sygehus 27. mai í ár. Endamálið við hesi verkætlan er at geva børnum, sum eru innløgd á donskum og føroyskum sjúkrahúsum eina bamsu, ið tey kunnu føla seg trygg við og sum er allergi-testað. Navnið Asbjørn er sett saman av orðunum astma og bjørn.

Saman við bamsunum er eitt kort við upplýsingum til foreldrini, um hvussu tey kunnu ansa eftir við húsdjórum, mati og hvussu tey annars kunnu innrætta seg soleiðis, at ovurviðkvom børn ávirkast minst møguligt.

Mikudagin kom formaðurin í Føroya Astma/Allergifelag, Evy Danielsen í Miðvági, saman við døtrum sínum út á Landssjúkrahúsið við Asbjørn-bamsum til børnini sum vóru innløgd á barnadeildini har.

Nógv av børnunum sum liggja á barnadeildini hava astma ella allergi trupulleikar.

Virkir og privatpersónar hava møguleika at stuðla verkætlanini við at keypa bamsir. Formaðurin í Føroya Astma/Allergifelag, Evy Danielsen, sigur, at vónandi fær felagið stuðul, soleiðis at tey eisini kunnu læta bamsir til hini sjúkrahúsini í Føroyum. Áhugaði kunnu ringja til formannin á telefon 265321.



*Asbjørn-bamsir. Saman við bamsunum er eitt kort við upplýsingum til foreldrini, um hvussu tey kunnu ansa eftir børnum, sum eru ovurviðkvom*



*Mikudagin fingu tey á barnadeildini á Landssjúkrahúsinum Asbjørn-bamsir, f.v. Esther Djurhuus pedagogur á barnadeildini, Evy Danielsen, formaður í Føroya Astma /Allergifelag, Tove Thomsen, deildarsjúkrasystir á barnadeildini og átta ára gamla Jónhild Danielsen, sum handaði bamsurnar til barnadeildina*









# Buldur og brak í Hoyvík



*Ógvusligt ljóðar tað, tá sprongt verður í Hoyvík. So ógvusligt, at grannar hava klagað*

**Grannar til stóru útstykkingina í Hoyvíkshaganum hava meldað byggiharran til løgregluna, tí sprongt verður so ógvusliga. Men teir, sum hava eftirlit við byggingini, vissa um, at alt fer forsvarliga fram, og einki er at óttast**

SPREINGING
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Tað er sum við frontin í Hoyvíkshaganum fyri tíðina. Sprongt verður, so tað syngur eftirí, nú Býráðið ger útstykking til eini 170 hús.

Tað hevur fingið grannarnar at støkka uppfrá. Teir eru bangnir og óttast fyri, at skaði hendir, um ikki okkurt verður gjørt at sissa spreingigleðina. Illgruni er um, at spreingimeistarin ikki verjir við máttum, sum hann eigur.

– Tað er ógvusligt. Larmurin er øgiligur, húsini ristast og vit síggja grótið regna niður. Enn er eingin skaði hendir, men tað tykir mær nógv ógvusligari, enn tað nýtist at vera. Tað sær út til, at teir leggja ikki omaná, sum teir skulu, sigur ein av nærmastu grannunum, sum býr inni á Gøtu, har spreingingarnar nú eru í nánd.

## Løgreglan átalar

Løgreglan váttar, at hon hevur fingið fleiri fráboðanir um, at grannarnir kenna seg ikki tryggar og hava illgruna um, at alt fer ikki rætt fram.

– Grannarnir kæra seg um, at sprongt verður so harðliga, at tey eru bangin fyri, at okkurt kann henda. Vit hava átalað hetta hjá býráðnum, sum er byggiharri, men annars síggi eg einki í døgnrapportini um, at vit hava gjørt meira við málið, sigur vakthavandi á Politistøðini í Havn.

Tá vit tosaðu við Býráðið í gjár, kendu tey enn onki til nakra átalu frá løgregluni, men vístu til byggiplássið og Verkfrøðingastovuna, sum hevur yvirskipaða eftirlitið við byggiarbeiðnum.

## Alt eftir forskrift

Palle Henriksen, verkfrøðingur, hevur ábyrgdina av byggiplássinum. Hann vissar um, at alt er, sum tað eigur at vera.

– Alt verður gjørt eftir forskriftunum, og alt gongur trygt fyri seg. Her verður ikki slakað við nøkrum. Tú veitst ikki altíð, hvussu skotini fara, og tí kann henda, at okkurt stórt kemur upp í millum mátturnar, sigur Palle Henriksen, sum staðfestir, at tað verður vart fyri, áðrenn skotið verður.

Hinvegin skilir hann væl, at fólk kenna seg ótrygg, tí tað er ein ógvuslig hending, tá sprongt verður fyri einari so stórari útstykking. Men onki er at óttast.

– Hetta er ein stór útstykking, tíðin er knøpp, og tí eru stór buldur at hoyra viðhvørt. Men vit eru hampiliga langt frá húsum, og vit taka ikki óráð fyri, sigur Palle Henriksen.

Boðskapurin er tann sami frá Verkfrøðingastovuni, sum hevur yvirskipaða eftirlitið fyri býráðið. Hóast teir ikki eru barnagentur, sum sita yvir hvørjari spreinging, so er teirra fatan, at tað er forsvarligt í Hoyvíkshaganum.



*Stóru maskinurnar hjá J.K. Petersen og Byggitek í Hoyvíkshaganum. Á Grækarismessu 2005 verður klárt at byggja*

*Mynd: Jens Kristian*

## Klárt at byggja í 2005

**Á Grækarismessu 2005 sleppa fólk loksins at byggja í Hoyvíkshaganum, upplýsir Mikael Viderø, býararkitektur. Bíðilistin eftir grundstykkjum er kortini framvegis stórur í høvuðsstaðnum**

ÚTSTYKKING
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

12. mars 2005 er settur til at vera dagurin, tá samtakið J.K. Petersen og Byggitek skal vera av Hoyvíkshaganum. Hóast tað helst verður soleiðis, at partar av hoyvíkshaganum eru lidnir og klárir at byggja innan ta tíð, so sleppur eingin at byggja fyrr enn tá, sigur Mikael Viderø, býararkitektur.

Talan er um góð 170 grundstykki, sum standa byggibúgvin í mars 2005. Sum er, eru øll grundstykkini á 400 og 500 fermetrar seld. Bara einstøk eru eftir av teimum, sum eru 300 fermetrar.

Í upprunaligu ætlanini var eisini meiningin at byggja randarhús ovast í Hoyvíkshaganum, men tann útbyggingin er fyribils sett í bíðistøðu, tí so lítil áhugi var fyri henni. Nú hevur Byggi- og býarskipanarnevndin sett eina projektering av jørð og betongarbeiðnum av randarhúsunum í gongd, og umhugsað verður, hvussu arbeiðið skal bjóðast út.

Útstykkingin í Hoyvíkshaganum hevur minkað nakað um eftirspurningin eftir grundstykkjum í Havn, men trýstið er framvegis stórt. Í løtuni eru umleið 975 fólk á bíðilistanum, verður upplýst á Snarskivuni. Fyri at avmarka tilflytingina til Havnar nakað, eru nýggjar reglur gjørdar. Tú skalt vera havnarborgari, og tú skalt ikki eiga ogn í høvuðsstaðnum frammanundan fyri at vera uppskrivaður.

Býráðið arbeiðir alla tíðina við eini heildarætlan fyri útbygging, sigur Mikael Viderø, og helst verða framtíðar útstykkingar eisini í Hoyvík.